TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Býlingshúsið millum Gilja.

**Stovnslýsing**
Í býlingshúsinum millum Gilja ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum og eini vøggustovu við 12 børnum.

**Størvini:**
**Látrið**, talan er um eitt pedagogstarv í barnagarðsstovu við 20 børnum í aldrinum 3-7 ár. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, at byrja 6. august 2001.

Eitt starv sum barnsburðaravloysari frá umleið 1. september 2001 og eitt ár fram. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Rókin**, talan er um tvey pedagogstørv í barnagarðsstovu við 20 børnum 3-7 ár. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna, at byrja 6. august 2001.

**Reiðrið**, talan er um eitt pedagogstarv í vøggustovu við 12 børnum 0-3 ár. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, at byrja 6. august 2001.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og stutt er niðan í hagan og yvir til Svartafoss.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kirstin Djurhuus, leiðara, tlf. 31 83 72, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum millum Gilja, millum Gilja 175, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 11. juni 2001.

SNARSKIVAN

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir tveimum pedagogum til Býlingshúsið á Ternuryggi.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna, at byrja 6. august 2001.

Eitt barnburðaravloysarastarv, 30 tímar um vikuna, at byrja 23. september 2001 og væntandi eitt ár fram. Bæði størvini eru í vøggustovuni.

**Stovnslýsing**
Í Býlingshúsinum á Ternuryggi ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum og eini vøggustovu við 12 børnum. Á stovnunum arbeiða 5 pedagogar og 7 hjálparfólk.

**Vit bjóða**
tvey áhugaverd størv, har tit fara at arbeiða saman við tveimum ágrýtnum hjálparfólkum. Har tú hevur møguleika fyri at gera tína ávirkan galdandi. Har tú saman við starvsfólkunum ert við til at gera vøggustovuna til eitt mennandi og trygt stað.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- hevur góð samstarvsevnir
- er røkin, álítandi og nærlagdur
- dámar væl at vera úti í náttúruni saman við børnunum
- er førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum
- dugir væl at finna uppá og hugsa nýtt, tá ið tað snýr seg um at arbeiða við 0-3 ára gomlum børnum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Heidi Henriksen, leiðara, tlf. 31 86 26, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10. juni 2001.

SNARSKIVAN

Sosialurin -har tað hendir

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til roknskapardeildina.

**Arbeiðsuppgávur**
- avgreiðsla av innkomnum posti
- skráseting og bóking av rokningum
- avstemman av ognarum
- annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv**
- skrivstovuútbúgving
- royndir innan bókhaldsarbeiði
- kunnleika til EDV
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hera Olsen, deildarleiðara, ella Tinu Johannesen, fulltrúa, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 4. juni 2001. Viðmerk á umsóknina "Skrivstovufólk".

SNARSKIVAN

---

Føroya Postfelag

# Skrivari

Føroya Postfelag søkir eftir skrivara.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Afturat vanliga skrivstovuarbeiðinum skal skrivarin taka sær av roknskapi felagsins.

Meira fæst at vita um starvið á tlf. 283794 ella 217231.

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi innan 25. mai.

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15
100 Tórshavn



# Sjálvsognarstovnurin Alv

**søkir eftir tveimum fólkum uml. 1/2 tíð, til sølubúðina.**

Størvini verða at byrja 1. juni 2001.

Vit síggja fegin at tú hevur:
- Handilsskúlaútbúgving og/ella áhuga og royndir í at standa í handli.
- Dugir at tosa danskt, enskt og helst eisini týskt.
- Ert fyrikomandi og sjálvstøðugur.

Av tí at vit selja heimagjørdar vørur, er ynskiligt, at umsøkjarin eisini hevur kunnleika til handgjørdar vørur.

Møguleiki er fyri at hava skiftandi arbeiðstíð, og eisini frídagar.

Størvini verða lønt sambært S&K sáttmálanum.

Umsóknarfreistin er 26. mai 2001.

Umsóknir skulu sendast til:

**Sjálvsognarstovnurin Alv**
430 Áir

---

# Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** Peugeot 206 1.6 XS
**Árg.:** 1999
**KM:** 22.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Fróði Müller, sýnsmaður
e-mail: fm@trygging.fo
Beinl. tlf. 345727
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰ og fríggjadag kl. 08⁰⁰–16⁰⁰

---

# Bilur við stórum skaða til sølu

**Merki:** Citroën Saxo 1.5 Diesel 3/h
**Árg.:** 1998
**KM:** 57.789

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Fróði Müller, sýnsmaður
e-mail: fm@trygging.fo
Beinl. tlf. 345727
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰ og fríggjadag kl. 08⁰⁰–16⁰⁰

---

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

## Útbúgving

### Nú er tíð at søkja um upptøku

Við eini útbúgving frá Føroya Sjómansskúla liggja øll heimsins høv opin fyri tær. Lærugreinarnar fevna um siglingarfrøði, skipstøkni, lastaviðgerð, samskifti, veðurfrøði, skipsfyrisiting, leiðslu og samstarv, maskinfrøði, samfelt skipsræði, føroyskt, enskt, danskt, rokning, støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði, digitaltøkni, sjórætt, virkisbúskap, sjóreglur, heilsufrøði, fiskivinnu, teld, umframt ymisk skeið.

**Heimaskipari**
1. hálvár | 2. hálvár

**Skipari**
3. hálvár

**Skipsførari**
4. hálvár
5. hálvár | 6. hálvár

Skúlin byrjar mikudagin 1. august 2001.

Hetta er seinasta ferð, at tikið verður inn eftir verandi skipan. Í januar 2002 verður tikið inn eftir nýggju lógini.

Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skúlan.

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO*

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 357500
Fax +298 357502
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo

---

Sosialurin
Sosialurin
i